

## Viljomur settur í samband við FC Fyn

Føroyski U21 landsliðsleikararin, Viljomur Davidsen, er møguliga á veg til FC Fyn, sum spælir í donsku 1.deild. Tað skrivar fyens.dk, sum eisini skrivar, at venjarin hjá FC Fyn, Anders Gerber, leingi hevur leita eftir einum vinstra bakki.. Viljomur Davidsen spælir í løtuni á eykaliðnum hjá OB, umframt at hann eisini hevur spælt fleiri dystir á føroyska U21 landsliðnum í seinastuni.

*Viljomur Davidsen er nummar 2 (fremst, næst frá høgru)*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FØROYAR - SERBIA
TÓRSVØLLUR KL. 18.00

# Koyr á Føroyar!



*Brian Kerr, landsliðsvenjari, fyrireikar føroyska landsliðið til dystin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Vuvuzela bannað í Evropa

**FÓTBÓLTUR** Vit vóru øll um at kvalast av teimum ígjøgnum summarið. Vuvuzelahornini fingu sinnini í kók, og onkur boykottaði enntá heimsmeistarakappingini orsakað av ræðuliga larminum.

Eydna Skaale

Nú hevur Uefa tikið stig til at banna vuvuzelahornunum í altjóða dystum í Evropa.

Bæði í Champeons League og í Evropa League dystum verður bannað at hava vuvuzela á stadionøkinum. Uefa sigur orsøkina til forboðið vera, at ljóðið kann broyta stemningin á stadion, og køva ljóðið frá áskoðarunum. Harvið fáa teir ikki á sama hátt givið sína hugsan um fótbóltsspælið til kennar.

eydna@sosialurin.fo



*Larmandi Vuvuzalaðirnar verða tiskil ikki loyvdar á Tórsvølli í kvøld*

## Dejan Stankovic:

# Vit skulu vinna!



*Mynd: Álvur Haraldsen*

**LANDSLIÐSFÓTBÓLTUR** Tað segði Dejan Stankovic, sum er liðskipari á serbiska landsliðnumá tíðindafundinum, sum var í FSF húsinum í kvøld.

Tróndur Arge

Dejan Stankovic helt fyri, at hetta er ein dystur, sum øll longu halda at Serbia hevur vunnið, tí er tað umráðandi at tað arbeiðið verður gjørt liðugt í annakvøld.

Radomir Antic, ið er landsliðsvenjari hjá Serbia, metti at føroyska landsliðið hevur ment seg nógv og at tað fór at blíva ein trupul dystur í annakvøld. Radomir Antic hevur leikbann, ella venjarabann um ein vil. Hann fekk leikbann frá FIFA efti tapið hjá Serbia ímóti Avstralia í HM endaspælinum. Tí verður Radomir Antic ikki at síggja á bonkinum hjá Serbia, meðan dysturin verður.

Eftir tíðindafundin var venjing á skránni á Tórsvølli, men onkrir av serbisku leikarunum tóktist eitt sindur stressaðir ella í ringum lag. Millum annað fekk ein serbiskur myndamaður av at vita frá Nemanja Vidic, tí hann stóð á vøllinum. Á veg ímóti hinum tíðindafólkunum risti hann bara við høvdinum og hevði nøkur minni pen orð at siga um Vidic.

Dysturin verður í kvøld á Tórsvølli klokkan 18.00.

trondur@sosialurin.fo